## DAGSINS MEINING

# Ferð og trygd

Býráðsformaðurin í Havn hevur uttan víðari givið boð um, at ferðsluforðingar, vegbungur, skulu gerast á ávísum staði í býnum. Bakstøðið fyri hesi avgerð er, at stór vanlukka mundi hent har á staðnum seinasta vikuskifti. Avgerð býráðsformansins verður av nøkrum hildin at vera sjalvráðin og tikin í óðum verkum. Onnur halda avgerðina vera púra beina, og tey stuðla býráðsformanninum. Soleiðis er ofta, at ein skjót avagerð kann skapa skilnað millum borgarar í einum býi. Tað vil so vera.

Avgerð býráðsformansins kann tykjast sum ein spontan og illa umhugsað avgerð. Vit eru ikki samd í hesi meting. Men vit halda samstundis, at henda avgerð hevur stóran súmbolskan ella ímyndaligan týdning. Avgerðin er eitt tíðartekin. Hon er ein ímynd upp á støðugt versnandi viðurskifti í føroysku ferðsluni við atliti at ov nógvari ferð. Øll vita, at ov nógv ferð er ein skjótt vaksandi trupulleiki. Øll vita, at ov nógv ferð setir fólk í ferðsluni í stóran vanda. Hetta er galdandi fyri førara eins væl og fyri onnur í ferðsluni. Vit hava á tingi samtykt ein null-hugsjón. Hetta er eitt sera gott, dámligt og avgerandi neyðugt mál at seta sær. Kortini tykist tað sum trupulleikarnir av ov nógvari ferð bert standa við og vaksa. Her má vend koma í. Tað er við hesum bakstøði vit eiga at síggja avgerð býráðsformansins. Hon er eitt neyðarróp til aðrar myndugleikar, politi, skúlar, dagstovnar, løgting, landsstýri og foreldur. Og hon er ein ávaring til óvandaførarar. Nú er nóg mikið, og okkara býur er eingin rasarabreyt. Nú má nakað henda og setast má effektivt inn mótvegis tí nógvu ferðini á vegum okkara innan- sum uttanbýggja.

Vit vita, at ein herðing av ferðslulógini er á veg. Vit vita, at henda herðing snýr seg um ov nógva ferð og skilaleysa koyring. Hetta er tíverri bæði gott og neyðugt. Men hetta er ikki nóg mikið. Her skal ein heildarinnsatsur til, eitt veruligt ódnartak. Vit kunnu ikki framhaldandi liva við ljótu ferðsluskaðahagtølunum. Um nakrar dagar fara børnini aftur í skúla, og ferðslan ávísar tíðir á degnum veksur nógv. Børn í hópatali til gongu ella á súkklu eru um alt landið á veg í og úr skúla. Hesi børn eru í støðugum vanda orsakað av ov nógvari ferð og skilaleysari koyring. Her má nakað meira enn ein herd ferðslulóg til. Fordøming ger heldur einki gagn. Upplýsing millum bilførarar, børn og ung er ein vegurin. Betri koyrifrálæra, har hetta at bera seg ábygrdarfult at í ferðsluni má vera ein av mongum tættum. Henda innlæring eigur at byrja longu í heimunum, í barnagørðum og í fólkaskúlanum. At læra seg at hava fyrilit fyri øðrum menniskjum eigur at vera ein sjálvsagdur partur av allari uppaling.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Eru illir andar í Leynum?



**Undirbrotligheitin leingi livi! Áðrenn uttanríkispolitiska heimildarlógin kom í gildi, kundu føroyingar samráða seg lidnar um ein fríhandilssáttmála við Ísland, sum fevnir um øll tey sonevndu fýra frælsini. Nú ómegdarlógin er komin í gildi, sigur danska stjórnin, at løgfrøðisligar forðingar eru fyri at taka lut í júst teimum somu fýra frælsinum, tá talan er um EFTA. Er ongin klokka farin at ringja hjá løgmanni og samgonguni?**

**Høgni Hoydal**

Uttanríkispolitiska ómegdarlógin hjá løgmanni og samgonguni skuldi standa sína roynd, nú forsætisráðharrin vitjaði í Føroyum. Løgmaður hevur ferð eftir ferð roynt at geva føroyingum ta fatan, at talan er um eitt "søguligt frambrot" og at vit nú veruliga kunnu taka lut í altjóðagerðini.

Andstøðuflokkarnir, Tjóðveldisflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, hava hinvegin víst á, at talan er um eitt risa-afturstig, har danska stjórnin hevur gyrðað Føroyar inni í eini lóggávu, har føroyingar nú bert skulu vera fulltrúar hjá Danska Kongsríkinum undir heitinum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne".

Hartil hevur andstøðan staðiliga víst á, at samgongutinglimir hava atkvøtt fyri eini lóg, har tað verður sligið fast, at føroyingar binda seg í donsku grundlógina og til ikki at ganga ímóti donskum áhugamálum, og at danir skulu spyrjast bæði áðrenn, undir og eftir eina samráðing.

### Vátur vøttur frá Anders Fogh

Og hvussu royndist nú fyrsta stigið í hesum stóra frambroti samgongunnar? Løgmaður hevði sjálvur lagt upp til, at nú skuldu Føroyar uppí EFTA og altjóðagerðina.

Men Anders Fogh Rasmussen gav honum vátan vøtt í Leynum. Við vanligum uttanumtosi og útsagnum sum: "at nu skal vi analysere først"...og "vi må jo holde os til loven"...og "i må først overtage flere områder" - so segði danski forsætisráðharrin so greitt bums nei, sum sigast kann á embætismannamáli.

Sosialurin hevur lagt hetta út sum "ein positivur andi". Ja, Sosialurin ger kanska tjúkt gjøldur burturúr løgmanni, tá teir í oddagreinum tosa um "Leynaandan", sum nú ræður millum Føroyar og Danmark.

Tí hetta kann bert ein vera ein ringur andi ella ein illur andi, um vit bert kenna eitt sindur til søguna og eisini vilja hugsa eitt lítið sindur fram um nøsina.

### Tað bar til áðrenn - men ikki nú

Áðrenn ein tílik ómegdarlóggáva kom uppá tal, hava føroyskir myndugleikar støðugt víðkað sínar ræsur sjálvir á altjóða pallinum.

Eitt nú hava vit samráðst um og gjørt ein fríhandilssáttmála við Ísland, ið fevnir um øll tey sonevndu "fýra frælsini" fyri vørur, kapital, arbeiðsmegi og tænastur.

Nú hevur løgmaður boðað frá, at vit ynskja at gerast partur í júst teimum somu fýra frælsunum í EFTA - so nú skal henda sonevnda "frambrots-lóggávan" standa sína roynd.

### Men hvat hendir?

- Fyri trimum árum síðani bar væl til at samráðast við Ísland og gera ein sáttmála lidnan til undirskrivingar, sum fevnir um tey fýra frælsini - eisini á málsøkjum, ið ikki eru fult yvirtikin.

- Nú ber sambært donsku stjórnini ikki til at gera júst tað sama mótvegis EFTA, tí krav er um yvirtøkur og víst verður til løgfrøðisligar forðingar. Hví var tað ikki galdandi, tá vit samráddust við Ísland?

- Nú sigur danska stjórnin, at Føroyar kunnu ikki gerast limir í EFTA sum Føroyar, men bert sum partur av danska kongsríkinum undir heitinum "Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne". Tað stendur jú í lógini, sum Løgtingið hevur samtykt. Eitt grovt afturstig í mun til Íslandssáttmálan og í mun til, at vit eitt nú gjørdust sjálvstøðugur limur í NAMMCO.

- Danska stjórnin førir nú fram, at sambært uttanríkispolitisku heimildarlógini, so er tað bert á fult yvirtiknum málsøkjum, at føroyingar kunnu gera sáttmálar vegna "Kongeriget Danmark". Tískil skulu nógv málsøki yvirtakast, áðrenn vit yvirhøvur kunnu umhugsa at koma uppí EFTA sum danskir fulltrúar.

- Danski forsætisráðharrin nýtir nú beinleiðis uttanríkispolitisku ómegdarlógina móti landsstýrinum, tí sum hann segði við danskar fjølmiðlar: "Nu må vi jo holde os til loven".

### Synd í løgmanni

Sostatt er virkisførið hjá føroyingum longu munandi skert í mun til tíðina undan henda lóggáva fekk gildi.

Spurningurin er tí: Hvaðani koma tær løgfrøðisligu forðingarnar mótvegis EFTA, sum ikki vóru og eru í fríhandilssátmálanum við Ísland?

Svarið kann bert vera eitt: Løgfrøðisligu forðingarnar verða settar eftir hugi og ynski hjá donsku stjórnini við hesi sonevndu uttanríkispolitisku heimildarlógini í hondini. Við hesum "søguliga frambroti" í hondini, sum løgmaður hevur skírt tað.

Hetta er syrgiligt at uppliva. Og mær tykti hjartaliga synd í løgmanni tá hann sat á beinkinum í Leynum. Kundi ikki annað enn hugsa: "Undirbrotligheitin leingi livi!"

Hinvegin er ongantíð ov seint at læra av mistøkum og at hálsa um. Vit eru tilreiðar at hjálpa løgmanni at taka ómegdarlógirnar av sum skjótast, áðrenn tað gerst uppaftur pínligari hjá løgmanni og samgonguni.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**

Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.